# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
NIELS PETERSEN
NIELS@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Rennarar innvíga nýggjan veg



**Leygardagin 17. november fer Landsverk at taka í nýtslu eitt nýtt vegastrekki. Talan er um vegastrekkið millum bygdirnar Skála og Strendur. Í hesum sambandi hava ítróttarfeløgini á vestara armi á Skálafjørðinum skipað fyri heilsurenning**

HEILSURENNING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Landsverk fer leygardagin at taka í nýtslu eitt nýtt vegastrekki millum bygdirnar Skála og Strendur, og í hesum sambandi hava ítróttarfeløgini á vestara armi á Skálafjørðinum skipað fyri heilsurenning.

### Vóna góða undirtøku

Heilsurenningin byrjar kl 12 leygardagin, og fyrireikararnar Tóra Joensen og Andras Danielsen, meta at øll kunnu luttaka í hesum tiltaki.

-Teinurin er somikið stuttur, at vit vænta at bæði børn og gomul, heilsuáhugaði og fólk trillandi við barnavognum, o.s.v. koma at luttaka og á tann hátt eisini stuðla ítróttarfeløgunum á vestara armi á fjørðinum, sigur Tóra Joensen, ein av fyriskiparunum. Hon leggur afturat, at tað er ein gyltur møguleiki hjá fólki, ikki bert í nærøkinum, men allastaðni frá, at koma at vera saman um nakað sunt, og samstundis stuðla ungdóminum í ítróttarfeløgunum á vestara armi á Skálafjørðinum.

### Stuðul

Kostnaðurin á tiltakinum er bert 100 krónur fyri vaksin og 50 krónur fyri børn, og pengarnar fara óskalaðir til raksturin av ítróttarfeløgunum á vestara armi á Skálafjørðinum. Við í prisinum er ein t-shirt, til minnis um tiltakið og so skipar Landsverk eisini fyri onkrum leskiligum á mállinjuni.

### Strekkið

Strandavegurin er landsvegur frá skákvegnum oman til Skála bygd og út á Hulk á Strondum.

Samlaða longd uml. 4,3 km. Vegbreidd: 7,0 m koyribreyt við 1,5 m breiðari vegøksl í bæði borð.

Strandavegurin er partur av framtíðarhøvuðsvegakervinum í Føroyum, sum lýst í Samferðsluætlanini fyri Føroyar 2008-2020.

### Hátíðarhald

Tá hendingar av hesum slagi koma fyri er vanligt við hátíðarhaldi, og so er eisini í hesum førinum.

Áðrenn Strandavegurin letur upp, fara fólk at renna og ganga frá har, gamli vegurin kemur í tann nýggja á Strondum og eftir øllum tí nýggja vegnum. Kl. 13.00 klippur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, snórin og so fer eitt bilafylgi eftir nýggja vegnum til Strendur og aftur, og beinleiðis oman í cafeteria í ítróttarhøllini á Skála, har Landsverk skipar fyri almennari móttøku við røðum og onkrum løttum ábiti.

Annars verður ein ítøkilig skrá fyri alt tiltakið kunngjørd í morgin.

## FAKTA UM STRANDAVEGIN

| | |
|---|---|
| **Longd** | 4,3 kilometur |
| **Breidd** | 7,0 metur |
| **Vegøksl** | 1,5 metur báðumegin |
| **Kostnaður** | 51,8 milliónir krónur |

# Fráboðan um úrslit

Leygardagin 27. oktober varð ein dystur í Meistaradeildini hjá kvinnum spældur í høllini í Trongisvági, og úrslitið av hesum dysti varð 3-0 til heimaliðið. Úrslitið er eitt av teimum mongu, ið ikki eru fráboðaði í ymsu deildunum, og má tað sigast at vera heldur løgið. Ein kundi trúð at flogbóltur í bestu deildini hjá kvinnum hevur størri áhuga, enn so. Men hvussu er og ikki, so er úrslitið nú skrásett, og niðanfyri sæst nýggja stigatalvan inklusiv 3-0 sigurin hjá TB.

np

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 3 | 3 | - | 0 | 9 | 3 | 6 | 6 |
| 2 | SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 | Dráttur | 5 | 3 | - | 2 | 10 | 9 | 1 | 6 |
| 4 | KÍF | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 4 |
| 5 | TB | 5 | 2 | - | 3 | 8 | 9 | -1 | 4 |
| 6 | Mjølnir | 2 | 0 | - | 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |
| 7 | Fleyr | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |

## Rættleiðing

Í blaðnum mánadagin skrivaðu vit um flogbólt, og í tí einu greinini nevndu vit, at Marina Popovic er givin í TB-Flogbólti, orasakað av at hon ikki fær pengarnar fyri at spæla. Hetta er ikki heilt rætt, tí tað er komið fram at TB-Flogbóltur og Marina hava skilst í semju, og at Marina hevur valt at nýta sína tíð til arbeiðið hjá sær, í staðin fyri flogbólt. Sostatt skuldi hetta verið komið upp á pláss.

np



*Marina Popovic sæst her í dysti fyri TB, hinar báðar eru Sólva Dimon og Maja Popovic*
*Mynd: Álvur Haraldsen*